# Kári vil hava alt fram

**LØNIR HJÁ POLITIKARUM** Nú verður uppskot lagt fyri Løgtingið um at allir politikarar skulu leggja alment fram, hvørji størv teir hava afturat sínum politiska starvi og hvat teir fáa í løn

Áki Bertholdsen

Allir løgtingslimir og landsstýrislimir skulu leggja alment fram, hvørji størv tey hava afturat tí politiska starvinum og hvat teir fáa í løn fyri hesi eykastørv.

Tað heldur Kári á Rógvi, løgtingsmaður og formaður fyri Sjálvstýrisflokkin.

Hann fer nú at leggja uppskot fyri Løgtingið um at allir løgtingslimir og øll landsstýrisfólk, skulu almannakunngera, hvat tey hava av størvum, nevndarsessum o.a., afturat tí politiska starvinum.

Hetta skal eisini verða galdandi fyri tey, sum stilla upp til val.

- Í nógvum londum hava politikarar skyldu til at almannakunngera, hvørji fíggjarlig áhugamál, teir hava, sigur hann.

- Samstundis verða allir hesir upplýsingar lagdir alment fram, so at veljarin veit akkurát, hvat valevni fáast við uttanfyri politikk og hvørji fíggjarlig áhugamál, vælevnini annars hevur.



**SKAL FRAM**

*- Eg haldi, at hesi upplýsingar skulu fram so at veljarin eisini kann taka hendan vinkulin við, tá ið hann setir krossin, sigur Kári á Rógvi*

### Ein dygd ella ein vansi

Kári á Rógvi staðfestir, at vit hava reglar fyri, hvat ein politikari kann hava við almennum størvum afturat starvinum sum løgtingsmaður.

Hinvegin er onki mark er fyri, hvat ein løgtingslimur kann hava av privatum størvum og nevndarsessum o.s.fr.

- Og nú vil eg hava, at hesi størv, nevndarsessir og fíggjarligu áhugamál annars, skulu almannakunngerast fyri veljaran, so at hann eisini kann taka tann vinkulin við, tá ið krossurin skal setast, sigur hann.

- Tað er væl hugsandi, at onkur veljari heldur, at tað er ein dygd, at ein politikari hevur nógv jørn í eldinum, tí so veit hann kanska meiri um, hvat hendir í samfelagnum. Men tað er eisini væl hugsandi, at onkur annar veljari heldur, at ov nógv hjástørv, er ein vansi fyri tað politiska arbeiðið.

- Undir øllum umstøðum haldi eg, at veljarin eigur at hava allar hesar upplýsingarnar, so at hann veit, hvønn hann velur.

Hann ætlar at hava uppskotið klárt at leggja fyri Løgtingið í seinasta lagi um mánaðarskiftið februar-mars.

aki@sosialurin.fo

**» Seinasta leysasøgan er, at Kári á Rógvi tjenar eina slaka millión uttanfyri tingið**

# Ósannindi um Kára

Kári á Rógvi sigur, at tað er ikki brádliga íkomið, at hann hevur fingið hugskotið um at tað skal vera alment, hvørji størv, politikarar hava afturat sínum politisku størvum.

- Hugskotið rann framm fyri meg fyri einum ári síðani, tá ið ein av okkara fremstu politikarum var í Kringvarpinum og greiddi Føroya Fólki frá, at eg hevði so nógv alment arbeiði afturat mínum løgtingssessi, at eg tjenti meiri uttanfyri Løgtinginum enn eg gjørdi sum løgtingsmaður.

- Hesi ósannindi sluppu at standa ósvarað, tí tíðindafólkini høvdu ongastaðni at sláa upp fyri at eftirkannað páhaldið.

Síðani hava leysasøgurnar um almennu lønirnar hjá Kára á Rógvi vundið upp á seg og tað seinasta, ið er komið okkum á Sosialinum fyri oyrað, er, at hann tjenar eina slaka millión á Fróðskaparsetrinum.

- Slíkur sum hesar kunnu bara ganga sum rótasúpan í einum landi, sum byggir á eina mentan, har alt skal vera loyniligt.

- Veruleikin er, at mín løn á Fróðskaparsetrinum liggur um 20.000 krónur um mánaðin, sigur Kári á Rógvi.

## Síggja og hoyra um seyð á Tvøroyri

Leygarkvøldið klokkan 19.30 verður forvitnislig kvøldseta á Seglloftinum á Tvøroyri.

Tað er Frits Johannesen, sum skipar fyri eini kvøldsetu um seyð, seyðahald og fjallgongu

Magna Thomassen, lærari, dóttir Petrinu og Robert Joensen, fer at siga frá faðir sínum og Kristin Poulsen, lærari, sigur frá seyðasøgum úr Fuglafirði.

Harafturat fer Jákup Pauli Johannesen, arkitektur, at siga frá seyðasøgum frá faðir sínum, Evaldi Johannesen, og Petur Martin Petersen, kunningarstjóri, ber fram yrking um seyð og seyðahald, sum hann hevur yrkt. Harafturat fer Dávur Winther, mentanarleiðari í Klaksvík, at siga frá seyðarakstri á Skarvanesi.

Annars fer Niels Midjord at syngja um Fimm feitar flugur og Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður, sum eisini er rættiliga kringur á tangentum, fer at spæla undir ímeðan tey syngja "Nú hvítna tindar" og "Fuglafjørður"

Tey fara eisini at vísa bæði gamlar og nýggjar myndir á stórskíggja og ein stuttur filmur sum Kjartan Madsen, hevur tikið, verður eisini vístur.

Inn ímillum verður eisini ein steðgur, har tað ber til at strekkja sær einini, fáa sær ein drekkamunn og, ikki minst, tosa um seyð.



## 40 ára aldursmark

Tað er ikki ofta, at tey 39 ára gomlu eru ov ung til at taka lut í einum tiltaki í náttarlívinum í Havn.

Men tað verða tey, tá ið gamlamannadansur verður í Sjónleikarahúsinum føstulávintsleygarkvøld. 5 mars.

Og í hesum føri skal orðið gamlamannadansur takast heilt bókstaviliga, tí aldurmarkið at sleppa inn, er – 40 ár.

Tað verða Marnar og Árni sum fara at spæla tónleik frá fimmti og sekstiárunum, saman við einum bólki.

Fyri at seta ein serligan dám á, og koma í rætta lagið, fara tey at spæla og syngja í svørtum buksum, hvítum skjúrtum og svørtum slipsi.

Hetta er ein roynd at lokka tey dansiglaðu, trøllvaksnu í dans, sum annars ikki eru úti so ofta.

Men tað verður okkurt gott at leska sær á, meðan dansurin gongur.

Atgongumerkjasølan byrjar í Kunningarstovuni í Havn í dag og tað ræður um a skunda sær, tí einans 400 atgongumerki verða seld.

Tað, sum kemur inn av peningi, fer til at røkja Sjónleikarahúsið fyri.

Á myndini er tað Marnar, tann ovari, og Árni, í trappuni upp á kendu balkongina í Sjónleikarahúsinum.